# Oyggjaleikir 2005
SHETLAND

# Hvønn minutt í hvørjum gulli

**Liðskiparin á fótbóltslandsliðnum hevur higartil spælt hvønn minutt, sum kvinnulandsliðið hevur spælt. Og enn hevur hon ongar ætlanir um at gevast**

FÓTBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*


*Føroyski liðskiparin helt tað vera keðiligt, at kappingin hesa ferð varð skipað sum bólkaspæl*

**Lerwick:** Tað var kanska ikki annað væntandi, enn at føroysku fótbólts-kvinnurnar fóru at endurvinna gullmerkini á oyggjaleikunum. Kvinnur okkara hava nevnliga enn til góðar at tapa dyst í oyggjaleikahøpi. Nakað sum esini hevur fingið fólk at rópa avbjóðingina ov lítla.

Ítróttarliga var avbjóðingin tó størri hesaferð, enn hon hevur verið. Ikki minst, tí talan nú eisini var um tvey lið, sum kundu matcha okkara, og tó at vit knógvaðu bæði Álandi og Bermuda, so var talan í báðum førum um fínar dystir hjá okkara kvinnum.

Tað ásannaði føroyski liðskiparin, Bára S. Klakstein, eisini, men hon helt kortini, at leikirnir væl kundu verið meira áhugaverdir.

- Tað gav okkum sjálvandi nakrar tættari dystir, at Bermuda og Áland vóru við hesaferð. Men hinvegin, so haldi eg tað vera keðiligt, at vit ikki fingu nakra finalu hesaferð, nú talan var um bólkaspæl.

- Ikki minst, tá vit somikið tíðliga í kappingini hittu Áland og Bermuda. Tað gjørdi at vit longu undan teimum báðum seinastu dystunum vóru púrasta vísar í, at vit høvdu vunnið gullið, og tí kundu vit í nógvar mátar taka okkum av løttum her.

**Ongantíð skift út**

Umframt at vera liðskipari og aldursforseti á kvinnulandsliðnum, so hevur Bára eisini eitt annað merkisvert met í oyggjaleikahøpi.

Síðani fyrsta dystin, sum var ímóti Isla of Man á Isle of Man í 2001, hevur Bára nevnliga spælt hvønn tann einasta minutt hjá føroyska liðnum. Og hóast hon ikki vildi gera nakað stórvegis burtur úr hesum, so viðgekk hon, at hetta var nakað, sum hon var eitt sindur errin av.

- Tað er man sjálvandi altíð. Tað er jú nakað serligt í so máta.

Og hugsaði tú ongantíð um, at hetta metið kanska skuldi fara, um nú venjarin valdi at skifta teg út í onkrum dysti?

- Tað haldi eg ikki, at tú hugsar um, tá tú spælir. Man fer út fyri at gera sítt besta, og so má dysturin ganga sína gongd. Líka mikið um eg eri partur av honum ella ikki.

Og ætlar tú tær eisini at vera partur av liðnum um tvey ár, tá kappast verður á Rhodos?

- Ja. Tað verði eg, staðfesti ein púrasta avgjørt Bára Skaale Klakstein at enda.

# Vit vinna á heimavølli

**Álendski venjarin hevði bara rósur til føroyska kvinnulandsliðið. Men hann ávaraði um, at hansara gentur ætla sær gull á leikunum um fýra ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** Fyri føroyska kvinnlandsliðið mundi tað kennast hugagott, at Áland hevði lið við á oyggjaleikunum, eftir at tey ikki vóru partur av leikunum fyri tveimum árum síðani.

Eftir heiðursmerkja handanina fríggjadagin, fingu vit orðið á álendska venjaran, og hann duldi ikki fyri, at júst dystirnir móti Føroyum vóru ein av orsøkunum til, at liðið aftur hevði teknað luttøku.

- Tað vóri fíggjarligar avmarkingar, sum gjørdu, at vit ikki satsaðu upp á kvinnufótbóltin fyri tveimum árum síðani. Vit byrjaðu ístaðin frá grundini, og nú royna vit so at byggja eitt nýtt lið upp. Og sum tú kanska hevur sæð, so er talan um sera ungar spælarar, sum eru við hesaferð.

Fyri fýra árum síðani var talan um ein kanón-dyst millum Føroyar og Áland. Vóru dystirnir móti Føroyum ein av orsøkunum til, at tit aftur teknaðu luttøku.

- Sjálvandi vistu vit, at dysturin móti Føroyum fóru at verða tann truplasti, og tað var kanska eisini her, at størsta avbjóðingin lá. Hinvegin, so roknaðu vit ikki við, at vit fóru at vinna á Føroyum. Okkara mál var at taka ein dyst í senn, og at vit skuldu standa okkum so væl sum gjørligt, í hesum.

- Men upp á longri sikt, so vilja vit altso vera við heilt frammi í oddinum. Og sjálvur gleði eg meg longu til leikirnar á Álandi um fýra ár, tá vit skulu taka gullmerkini frá tykkum, segði álendski venjarin við einum stórum smíli at enda.


*- Vit byggja eitt nýtt lið upp, og tí roknaðu vit ikki við nøkrum hesaferð. Men bíða bara til tit koma á vitjan á Álandi um fýra ár, helt álendski venjarin, eftir at tey høvdu tikið móti silvurmerkjunum fríggjadagin*

## Sætta pláss til Boga



Súkklingin fekk eingi heiðursmerki á hesum sinni, men í seinastu kappingini var tó nær við, at Bogi Kristiansen helt lív í góðu hagtølunum, sum føroysku súkklararnir hava havt.

Bogi var nevnliga heilt frammi í feltinum tað mesta av tíðini, tá súkklararnir við fullari ferð drønaðu runt í gamla býarpartinum í Lerwick.

Hann megnaði tó ikki at fylgja heilt við, tá feltið móti endanum skrædnaði. Ein súkklari av Man fór seinastu umgangirnar av álvara avstað, og so fóru hinir súkklararnir undir jagstranina. Tað eydnaðist fýra súkklarum at súkkla seg heilt nær vinnaranum undan seinasta umfarinum, men tó at teir fingu somu tíð, so rakk hetta ikki til at taka Man-búgvan.

Beint eftir førarafeltið sat Bogi Kristiansen fremstur í einum bólki av fýra, men teir gjørdust altso 3,7 sekund ov stuttir í mun til høvuðsfeltið.

**-jm**

## Nýggjur formaður

**Lerwick:** Altjóða Oyggjaleikanevndini – IGA – hevði aðalfund í Lerwick týsdagin, og millum annað var nevndarval á skránni.

Formaðurin, svíin Bo Frykenstam, legði frá sær, og hann var samstundis valdur til heiðurslim í nevndini fyri lívið. Hann hevur sitið í nevndini í nógv ár og hevur verið formaður síðani 2001.

Nýggjur formaðurin er av Isle of Man, og hann eitur Brian Partington. Hann hevur verið varafomaður í nevndini til nú.

Hini fólkini í nevndini hjá IGA eru: Jørgen Pettersen (Áland), Eric Legg (Guernsey), James Johnston (Hetland) og Donna Jones (Ynes Mon).

**-ek**